Framhald av forsíðuni

– At vera grafikari er nakað, sum eg kann liva av. Hitt er nakað, sum eg geri við síðuna av.

Eisini hevur virkni danin útgivið eitt yrkingasavn. Hetta var í 1996. Við heitinum »Ophav«. Yrkingasavnið viðger, hvussu tað er at vera dani í Føroyum.

– Tað er løgið at vera dani í Føroyum. Tú umboðar eitt hjálandaveldi, men samstundis ert tú eisini í etniskum minniluta. Yrkingasavnið viðger eitt evni, sum ikki hevur verið skrivað um fyrr, sigur Ole.

PartKvadrat og frímerki

Ígjøgnum árini hevur Ole verið við í eini 20 frímerkjaútgávum. Hann hevur bæði teknað sjálvur og verið við í útgávunum á annan hátt. -

- Í løtuni fáist eg tó ikki nógv við tað listarliga arbeiðið. Men tað kemur helst aftur einaferð, tá eg havi meira yvirskot til tess, sigur Ole Wich.

– Fyri meg er tað at útrykkja seg tað týdningarmesta. Tað snýr seg alt um at úttrykkja seg, og øll eiga eftir míni meining hava loyvi at úttrykkja seg. Hvussu tað so kemur út, antin tað er í myndum, teksti ella øðrum, er líkamikið.

Í løtuni arbeiðir Ole við eini verkætlan, sum hann kallar »PartKvadrat«.

»Partkvadrat« er ein hugtakandi og áhugaverd verkætlan.

– Tað er sjáldan tú sært ferningar. Í myndum og øðrum, so eru ferningar púra deyðir at arbeiða við. Men gongubreytin uttanfyri plantaguna í Havn, har eg havi gingið øll tey árini, eg havi verið í Havn, hevur flísar, sum eru ferningar, og teir hava allir løgin og spennandi mynstur. Teir býta seg upp á nógvar spennandi mátar, og ætlanin er so at geva út eina bók við 100 ymsum ferningum, greiðir Ole frá, sum longu er farin undir hesa verkætlan.

Tónleikur

Áhugin hjá Ole Wich liggur eisini í tónleikinum. Hann hevur í fleiri ár sitið í nevndini hjá Tutl, men hann sigur, at hann ongantíð hevur spælt nakað ljóðføri ella tónleik sum heild.

– Tónleikur hevur mín stóra áhuga. Men hetta hevur ongantíð verið meira enn á brúkarastøði. Og í og við, at eg havi kent Kristian Blak í fleiri ár, so havi eg fingist nógv við tónleik, sigur Ole.

Hann hevur tó arbeitt við tónleiki á aðrar hættir. Hann hevur gjørt nógv umsløg til fløgur, og so hevur eisini verið arbeitt við eini aðrari heldur øðrvísi fløgu. Hon hevur heitið »Brøytingar«.

– Eg kom við uppkastinum og hugskotinum, og síðani gjørdi eg eina framsýning í Norðurlandahúsinum. Hareftir eg gjørdi ein fløguhúsa. Síðani hava Kristian Blak og Yggdrasil lagt tónleik til listarverkini, sum vóru nýtt á framsýningini. Nú hevði eg gjørt myndir til tónleik so ofta, at eg helt eg skuldi royna tað øvugta, fortelur grafikarin.

Millum annað er eitt klassiskt stykki, sum eitur »Udstillingsbilleder«, sum russarin Modest Mussorgski hevur skrivað. Talan er um tónleik, sum er gjørdur til eina framsýning í St. Pætursborg í 1883.

– Eg havi so nú hundrað ár seinni, gjørt bíløt til tónleikin. So íblásturin kann vera alt. Sum eitt nú flísarnar uttanfyri plantaguna, greiðir Ole frá. Myndirnar, sum Ole gjørdi til henda tónleikin, hanga yviri í Musikkskúlanum á Frúutrøð.

– Hugskotum eru nóg mikið av. Spurningurin er bara, hvussu tú ært ført tey til lívs. Tað er ikki fyrr enn eitt hugskot er útført, at tað er nakað vert, heldur Ole.

Tað er bara hugflogið, sum setur mørkini, og hetta avspeglast sanniliga aftur í verkinum hjá skapandi dananum, sum vit hetta vakra várkvøldið í apríl nú siga farvæl við.

– Fyri meg er tað at útrykkja seg tað týdningarmesta. Tað snýr seg alt um at úttrykkja seg, og øll eiga eftir míni meining hava loyvi at úttrykkja seg. Hvussu tað so kemur út, antin tað er í myndum, teksti ella øðrum, er líkamikið, heldur Ole Wich

Mynd: Finnur Justinussen

EG MEINI TAÐ

Eg fari at sakna kríggið ...

Bergur Rasmussen skrivar:

Her fyri segði ein skilamaður við meg umborð á bussinum, at hann fór at sakna kríggið, tá ið tað var liðugt.

Eitt lítið sekund hevði eg hug at jarðleggja hann við nøkrum vælvaldum orðum, um tær líðingar og pínslur, tann deyða og ta oyðilegging vit seinasta mánaðin hava verið vitni til í teirri beinleiðis 'samsending', SvF borðreiðir við frá BBCworld.

Men so skilti eg brádliga poengið. Tað er hetta við at vera har, ið tingini henda.

Um ikki á staðnum, so í hvussu er á tráðnum.

Og tað eru vit øll meiri ella minni í hesum døgum, tí við teim myndum og viðgerðum, ið vit hava fingið varpaðar beinleiðis út í hvønn krók í landinum, eru vit tryggjað, at vit ...

... sleppa at sita hugtikin og øvundsjúk og sleva yvir ta einastandani hernaðarligu tøknina hjá USA — Stealth-flogfør, SMART-bumbur, infrareyðir nátt-gløðarar, fantastiska stórar flogberarar og armerað tanks — um hugurin liggur til avanseraðan mekanikk, forfínaðan elektronikk og stórar svørar maskinur.

... sleppa at sita bergtikin og eygleiða, hvussu tær reportasjur, nakrir av teim allarbestu journalistunum í heiminum greiða úr hondum dag og dagliga, verða hagreiddar við lekrum jinglum og flottum grafikki, um vit mest eru áhugað í grundleggjandi reglum víðvíkjandi miðlum og samskifti.

... sleppa at sita og gera seg klókan uppá, hvussu Romsfeld og hinir oljumagnatarnir úr Texas prógva, at Marx helst hevði rætt, tá ið hann helt uppá, at hjá kapitali snýr tað seg bara um tvinni ting, 1) at rávørur eru frítt atkomiligar, og 2) at fólk eru lukkuligir forbrúkarar, um lyndið liggur á vinstraveinginum.

... sleppa at prísa seg lukkuligan yvir, at við vælsignilsi frá marknaðinum kemur siðmenningin út í allar heimsins krókar ... alt við serligum atliti at oljuprísunum her heima, um hjartað, hóast skaldið segði tað øvugta í populera sanginum á sinni, liggur til høgru.

... at sleppa at frøðast um frítt at kunna tala, hugsa og halda tað man vil, tá ið man sær, hvussu brádliga meinigi maðurin á gøtuni í Bagdad broytti meining, tá ið Baath-flokkurin legði kongin, og Saddam flýddi yvir háls og herðar, soleiðis at man nú kann fáa eitt sett av spælikortum við teimum, sum eru 'Most Wanted'. — Saddam? Hann er sjálvandi 'The Ace of Spades', hvat man so kann leggja í tað!

... at sleppa at hálova Gruntvigianska grundstøði undir norðurlendskari almugu skúling, ið útruddaði analfabetismuna og harvið gjørdi tað trupult hjá beinleiðis einaræði at vinna lond her um okkara leiðir.

... at sleppa at brúka seg við kaffiborðið um okkurt annað enn mislukkaða fullveldisleistin, undirsjóvartunnlar og sløku úrslitini hjá KÍ saman við líkasinnaðum miðveystursserfrøðingum, ið hava sæð júst tað sama sum tú á skiggjanum kvøldið fyri ...

... tí tað er so vælsignað bara tað at sleppa at tendra sjónvarpið nær sum helst á døgninum væl vitandi, at tú ført lekran tónleik og flottar myndir inn í stovuna, samstundis sum høvið stendur tær í boði bæði at halda títt skúlaenska við líka og at fáa tað víðkað við útdýpaðum krígsretorikki, um hvussu fíggindaligar hálvhernaðarligar eindir 'drepa', meðan teir sameindu 'oyða'. — Í hesum sambandi fari eg næstan at sakna kunningarmálaráðharra iraka, tí hansara myndamál um slangur í oyðimørkini og feikar leigusveinar var so litrikt, spennandi, stuttligt og tápuligt.

— Ikki tí, fáur man fara at sakna Saddam Hussein og hansara harkalið.

Men kríggið! Tað fari eg sjálvandi at sakna! — Fert tú ikki eisini?

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo

Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Við heystlombum í Ásmundarskor

Annan páskadag fóru vestmenningar við heystlombum í fitilendi í Ásmundarskor. Hóast tað ikki beinleiðis er høgligt og ein stórur partur av seyðinum doyr burturfrá, so halda teir á við at hava seyð í Ásmundarskori

SEYÐUR
Heri á Rógvi

Gróðurin í ár hevur verið heilt óvanliga góður. Hetta var eisini størsta orsøkin til, at vestmenningar fóru við seyði í Ásmundarskor annan páskadag — 21. apríl. Neyvan nakað árið undan er farið so tíðliga við seyði í Ásmundarskor.

Líkindini henda dagin vóru eisini av teimum allarbestu. Sólin skein og gott var at sigla.



Ásmundarskor stingur 306 metrar úr havinum og hoyrir til Útihagan á Bjørgum.

Mynd: Heri á Rógvi

Við báti

Ásmundarskor liggur í ein útnyrðing úr bygdini Vestmanna. Ásmundarskor hoyrir til hagapartin Úti í haga á Bjørgum, sum er fimm merkur til støddar.

Komast kann til Ásmundarskor til gongu ella við báti. Lættast er at fara við báti, men ikki — og serliga um heysti — liggur altíð so væl fyri við bátinum, tí tað rekur hart við Ásmundarskor.

306 metrar eru til hægsta punktið á Ásmundarskor. Talan er um rættiligt fitilendi, har vektin plagar at vera góð - uttan tó at seta met.

Hendan dagin eru átta mans og fimm heystlomb við bátinum úr Vestmanna. Vanligt er at sleppa smáan seyð í Ásmundarskor. Størru veðragjólingarnir verða oftani koyrdir aðrastaðni í hagan, har tað tað er meira høgligt at fara eftir teimum aftur. Ein maður til hvønn seyðin plagar at vera við. Hendan dagin er eisini ein fjallaklintrari við, sum hevur roynt seg í Himmalaya fjøllunum. Onkur skal sigla bátin, og ein tekur myndir, og nýtir umberingina um, at tær óivað eru betri tiknar frá bátinum.

Áðrenn lagt verður frá landi verða tey fimm lombini savnað saman, og okkurt horn verður við megi tikið av.

Neyðugt er ikki at binda seyðin í bátinum — hann heldur seg upp á pláss. Meðan siglt verður, verður okkurt av lombunum roytt eitt sindur, tí ullin verður væntandi nakað tung.

Túrurin er leið, sum fólk fegin rinda fyri. Útsýnið er frálíkt, og líkindini kundu valla verið betri. Trý korter eru at sigla.

Hendan dagin er eingin trupulleiki at sigla og leggja at við báti. Tá sagt verður, at vit leggja at, so er tað kanska at taka munnin ov fullan. Heldur verður lagt so frægt at landi, at menninir fáa lopið í land.

Fyrst fara fýra mans á land. Eitt sindur av rópi skal til, sjálvandi. Og báturin skal líka venda einaferð millum bjørgini.

So er klárt at fáa sjálvan seyðin í land, sum tað jú snýr seg um. Royndi seyðamaðurin Hans Johannesen skipar fyri.

Gjørt verður á tann hátt, at seyðurin verður koyrdur í ein posa, og so verður hann háløður upp á eina hellu. Tað tekur bert eina lítla løtu, so kann seyðurin ganga fyrstu fetini í Ásmundarskor. Tveir mans eru eftir í bátinum fyri fáa seyðin upp. Tá allur seyðurin er komin upp á land, fara tveir teir síðstu eisini á land í Ásmundarskor.

Band er á hvørjum seyði, og nú byrjar strævni túrurin eftir bratta lendinum niðan á. Gott er tó at ganga, og hugurin er óføra góður.

Øll lombini hava staðið á bási í longri tíð, og tá orka tey vanliga ikki so væl. Týdningarmikið er tí ikki at fara ov skjótt fram, tí orkar seyðurin ikki at ganga, kann hann leggja seg, og talan verður um eitt øgiligt baks.

Sum sagt skal tað vera gott at ganga allanvegin, men tað krevur sjálvandi sítt at hála og lyfta seyðin.

Ein rás gongur niðan á, sum mest er lík einari trappu. Fyrsta teinin er tað ber helli. Tað er ikki fyrr enn komið verður niðaná, at tað góða grøna grasið í fitilendinum er at finna.

Royndirnar vísa, at tað nyttar ikki bert at fáa seyðin líka niðan á grasið. Hann skal leiðast allanvegin niðan til eitt ból, sum væl má liggja í 150-200 metra hædd. Í hesum umfarinum verður ikki farið allar 306 metrarnar.

Um heystið, tá farið verður eftir fitaðu lombunum, er oftani neyðugt at fara upp úr skorini við seyðinum.

Fyri teir, sum gera hetta, er hetta ikki nakar trupulleiki, men fyri ein, sum líður á, kann hetta vera ein stuttur vegur til eitt hjartaslag, tí rásin upp ikki gevur møguleikan til stórvegis fet av leið.



Seyðurin verður drigin upp úr bátinum í einum posa.

Mynd: Heri á Rógvi

Tað er eitt baks at fáa seyðin við sær. Hann hevur staðið á bási og orkar tí illa at ganga

Mynd: Heri á Rógvi

25%

Sambært hagtølunum doyggja fimm og tjúgu prosent av seyðunum, sum verða slept upp í Ásmundarskor.

Eru hagtølini eftirfarandi, verða bert fýra dripnir í heyst.

At sleppa seyð upp í Osmundarskor verður eisini gjørt við stórum váða. Men fragdin er kanska tað størri, tá íløgan gevur úrslit. Ikki tí tað finnast skor í sama parti av heiminum, sum geva størri møguleika fyri avkastið fyri íløguna.

Men fyri hesar fimm eigararnar við hvør sínum lambi, er tað bara ikki heilt tað sama. Ikki sami sportur.